# Arbeiðseftirlit uttan heimildir

**Hans Pauli Strøm vil hava greiði á, hví Arbeiðseftirlitið liggur at kalla lamið, tí tað ikki hevur nakrar kunngerðir at arbeiða eftir, eftir at nýggja arbeiðsumhvørvislógin kom í gildi í fjør.**



*Líka síðani arbeiðsumhvørvislógin kom í gildi í fjør, hevur Arbeiðseftirlitinum væntað kunngerðir at arbeiða eftir. Hans Pauli Strøm, tingmaður, vil nú hava landsstýrismannin at greiða frá seinføru málsviðgerðini.*

ARBEIÐSUMHVØRVI
*Magnus Dam*

Tað hevur gingið striltið hjá Vinnumálastýrinum at fylla út karmarnar í arbeiðsumhvørvislógini, sum kom í gildi í mai í fjør. So striltið, at málið nú er reist í einum fyrispurningi í løgtinginum.

Sambært nýggju arbeiðsumhvørvislógini skulu kunngerðir gerast, sum áseta reglurnar um arbeiðsumhvørvi á nógvum økjum. Talan er um umleið 40 kunngerðir, og nógvar teirra eru sera umfatandi. Men uttan kunngerðirnar er lógin ikki nógv verd, og hetta hevur Arbeiðseftirlitið gjørt vart við fleiri ferðir.

Hans Pauli Strøm, løgtingsmaður, vil hava landsstýrismannin í vinnumálum at greiða frá, hví arbeiðið at snikka til kunngerðirnar gongur so seint. Sambært Arbeiðseftirlitinum var eingin kunngerð lýst við heimild í nýggju lógini átta mánaðir eftir, at lógin kom í gildi. Hetta gongur út yvir arbeiðið hjá Arbeiðseftirlitinum, sum ikki hevur nakað at halda seg til í sínum eftirlitsarbeiðið.

Hans Pauli Strøm heldur, at vit í dag eru verri stødd, enn áðrenn nýggja lógin kom í gildi, og hann vil hava Bjarna Djurholm at greiða frá, hvussu gongst við at gera neyðugu kunngerðirnar. Eisini skal Bjarni Djurholm greiða frá, hvørjar avleiðingar tað hevur fyri eftirlitið, at ongar kunngerðir eru gjørdar. Hans Pauli Støm vil eisini hava at vita, hvussu nógv orka krevst fyri at fáa arbeiðið gjørt beinanvegin.

Javnaðartingmaðurin vísir á, at stjórin í Arbeiðseftirlitinum hevur sagt, at tað fleiri ferðir er komið fyri, at Arbeiðseftirlitið hevur tikið mál aftur, sum annars vóru brot á gomlu lógina um arbeiðaravernd. Orsøkin er væntandi kunngerðir á økinum.

– Støðan má tí metast at vera sera álvarslig fyri arbeiðsumhvørvið, sigur Hans Pauli Strøm í viðmerkingunum til fyrispurningin.

# Grundlógin liðug á ólavsøku

**Grundlógarnevndin verður liðug við arbeiðið hjá sær á ólavsøku, og í seinasta lagi 1. oktober verður uppskotið til eina føroyska grundlóg latið landsstýrinum.**



*Grundlógarnevndin fær nú freist til 1. oktober at gera seg lidna við uppskot til eina føroyska grundlóg. Formaðurin í nevndini, Jóan Pauli Joensen, væntar, at uppskotið verður liðugt á ólavsøku.*

FØROYSK GRUNDLÓG
*Magnus Dam*

Enn er ógreitt, um hon yvirhøvur kemur í gildi. Men eitt uppskot um, hvussu ein føroysk grundlóg skal síggja út, verður væntandi latið landsstýrinum 1. oktober í ár – meira enn eitt ár seinkað.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður í lógarmálum, hevur skotið upp at broyta lógina um grundlógarnevndina, so nevndin fær eitt longri skotbrá til at gera seg lidna við umfatandi arbeiðið at smíða eina føroyska grundlóg.

Eftir ætlan skuldi nevndin lata landsstýrinum uppskotið 1. juni í fjør, men arbeiðið dróg út, og eingin møguleiki var fyri at halda seg til tíðarfreistina, um talan skuldi verða um eitt gott og gjøgnumarbeitt uppskot.

Men nú er grundlógarnevndin komin so mikið væl áleiðis, at endi er í hendi. Formaðurin í grundlógarnevndini, Jóan Pauli Joensen, hevur boðað Høgna Hoydal frá, at tað ber til at hava uppskotið til føroyska grundlóg klárt á ólavsøku, um umstøðurnar eru til vildar.

Grundlógarnevndin skal síðani skipa fyri almennum hoyringum um uppskotið kring alt landið, og hetta arbeiðið tekur nakrar mánaðir. Væntandi kann landsstýrið hava eitt liðugt uppskot í hendi 1. oktober, sigur formaðurin í nevndini.

Av tí at arbeiðið gjørdist drúgvari enn ætlað, hevur nevndin eisini brúk fyri størri játtan. Høgni Hoydal sigur, at nevndin fær upp til hálvaaðru millión krónur at arbeiða við hetta árið av játtanini tilsjálvstýrismál.

Arbeiðið at smíða eina føroyska grundlóg er tað mest umfatandi lógarsmíðið, sum nakrantíð er gjørt í Føroyum.



# Samgongan samráðist aftur

**Samgonguflokkarnir sessaðust aftur í gjár til samgongusamráðingar. Løgmaður hevði vega Fólkaflokkin við sær eitt semingsuppskot. Skal samgonguni vera lív lagað, skal hon finna eina semju áðrenn vikan er liðin**



*Anfinn Kallsberg hevur lagt eitt semingsuppkot fyri Tjóðveldisflokkin, ið skal bøta upp á samgongustríðið. Men Fólkaflokkurin vil framvegis ikki, at uppskotið um at staðfesta sjálvsavgerðarrættin skal fyri tingið*

Mynd: Jens Kristian Vang

SAMGONGUKREPPA
*John Johannessen*

Fólkaflokkurin arbeiddi fyrrakvøldið og fyrrapartin í gjár við einum semingsuppskoti at leggja fyri Tjóðveldisflokkin í samgongustríðnum, sum leygardagin var við at forkoma samgonguni.

Tá Sosialurin fór til prentingar á middegi í gjár sat Fólkaflokkurin á fundi og legði seinastu hond á uppskotið. Tí eydnaðist okkum ikki at fáa hendur á semingsuppskotinum.

## Eingin sjálvsavgerðarrættur

Sosialurin skilir tó, at Fólkaflokkurin ikki ætlar sær at góðtaka, at eitt uppskot til samtyktar um at staðfesta sjálvsavgerðarrætt føroyinga og at boða ST frá hesum verður lagt fyri tingið.

Løgmaður segði leygardagin, at sjálvsavgerðarrætturin er so sjálvsagdur, sum dagurin í dag. Og hann vil ikki, at tingið skal staðfesta nakað, sum er sjálvsagt.

Somu fatan hevur Óli Breckmann, formaður Fólkafloksins.

– Tað er eingin meingin í, at vit fara í tingið at staðfesta sjálvsavgerðarrættin, sum allir flokkar eru samdir um, at vit hava. Og at vit kortini bert fáa ein tepran meiriluta við 18 atkvøðum fyri at samtykkja tað, sigur Óli Breckmann.

## Mugu taka seg saman

Helena Dam á Neystabø, forkvinna í Sjálvstýrisflokkinum, sum frá fríggjadegnum til leygardagin royndi seg sum semingskvinna millum Anfinn Kallsberg og Høgna Hoydal, hevur nú mist tolið.

– Nú mugu menninir taka seg saman. Hetta snýr seg ikki um annað enn eitt maktstríð millum teir valdmiklastu persónarnar í Føroyum, sigur Helena Dam á Neystabø.

Helena Dam á Neystabø vísir eisini á, at politiska støðan aftur er líka ógreið, sum leygardagin.

– Føroya fólk stendur nú enn einaferð og bíðar. Hetta kunnu Anfinn Kallsberg og Høgni Hoydal ikki bjóða fólki, sigur Helena Dam á Neystabø.

Forkvinna Sjálvstýrisfloksins vísir á, at Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin brádliga eru vorðnir ósamdir um eina ógvuliga realistiska ætlan, sum samgongan leingi hevur verið samd um.

Fyrsti landsstýrisfundurin síðani samgongan leygardagin var um at bresta varð hildin fyrrapartin í gjár. Men tá Sosialurin fór til prentingar, var landsstýrisfundurin enn ikki liðugur, og tí eydnaðist ikki at fáa at vita, um samgongukreppan varð viðgjørd á fundinum.

# Sambandsflokkurin vil privatisera

**Sambandsflokkurin skjýtur upp, at farið verður undir varisliga at privatisera Føroya Bank og Føroya Tele. Júst sama uppskot varð felt fyri einum ári síðani.**



*Sambandsflokkin vil hava landsstýrið at fara undir at privatisera Føroya Tele og Føroya Banka. Partabrøvini skulu seljast stigvíst — 10-15 prosent um árið, heldur flokkurin.*

PRIVATISERING
*Magnus Dam*

Føroya Banki og Føroya Tele skulu á privatar hendur, stendur tað til Sambandsflokkin. Eitt ár eftir, at júst sama uppskot fall í løgtingininum, mælir flokkurin enn einaferð til at fara undir eina stigvísa og varisliga privatisering av almennu partafeløgunum.

Í fyrsta umfari skulu 10-15 prosent av partabrøvunum í Føroya Tele og Føroya Banka seljast privatum, og síðani skulu 10-15 prosent seljast ár um ár.

Hóast arbeitt verður við at meta um virðið á almennu feløgunum og ætlanin er at selja tey einaferð í framtíðini, so er lítið sannlíkt, at Sambandsflokkurin fær savna nóg stóra undirtøku fyri sínum uppskoti. Tá ið málið var fyri í fjør, atkvøddu bert fimm tingmenn fyri uppskotinum, sum sostatt fall.

Eins og í fyrra uppskotinum, skjýtur Sambandsflokkurin eisini í hesum uppskotinum upp, at partabrøvini bara skulu seljast føroyingum. Men allir føroyingar skulu ikki hava líka góðan møguleika at keypa partabrøvini. Flokkurin heldur, at tað skal kannast, um teir 6000-7000 partaeigararnir í Føroya Banka kunnu fáa ein fyrimun fram um onnur, tá ið partabrøvini skulu seljast. Hetta skal sambært flokkinum gerast fyri at røkka út til ein breiðan keyparaskara beinanvegin.

Talan er um eitt uppskot til samtyktar, har heitt verður á landsstýrið um at leggja uppskot fyri løgtingið um privatiseringarnar. Sambandsflokkurin hugsar í fyrsta umfari bara um Føroya Tele og Føroya Banka, men onnur feløg kunnu eisini koma við í ætlanina.